# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Óluvu Hentze** fer úr Vesturkirkjuni fríggjadagin kl. 13.00. Tey, ið vilja minnast Óluva, kunnu lata eina gávu til nýggjan messuakul í Vesturkirkjuni, konta í peningastovnunum.

**Bjarni Skaalum**, fyrrverandi lærari í Vági, andaðist í heiminum fríggjadagin, 85 ára gamal.

**Óli Christian Danielsen, Saltangará**, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin, 78 ára gamal.

**Greta Wenningstedt Villadsen**, vanliga nevnd **Lulla**, andaðist í Holbæk hósdagin, 80 ára gomul.

†

Kunngjørt verður ætt, vinum og kenningum, at kæra systir, mamma, vermamma og omma okkara

**Louisa Udbø Jensen**
Tórshavn

andaðist týsdagin 9. juni, 78 ára gomul.
Kistan fer úr Heiminum í Vallalíð hósdagin kl. 18.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
fríggjadagin kl.14.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jóhan, Sólrun og Eydna**

Tey, ið ynskja at minnast Louisu, kunnu lata Heiminum í Vallalíð eina gávu - konta í peningastovnunum.

†

Kunngjørt verður ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Óli Chr. Danielsen**

andaðist sunnudagin 7. juni, 78 ára gamal.
Kistan fer frá Kapellinum á Landssjúkrahúsinum,
hósdagin kl. 17.
Jarðarferðin verður úr Berøa
fríggjadagin 12. juni kl.14.

**Jona og børn við familjum**

Tey, ið ynskja at minnast Óla, kunnu lata eina peningagávu til Zarepta - konta í peningastovnunum.

### 60 ár

Leygardagin 13. juni verður Niels Midjord úr Fuglafirði 60 ár. Dagurin verður hildin á Muntra frá kl. 18:00

# Fótbóltslið í Bøgøtu



Hesa myndina, ið er av einum fótboltsliði hjá Bødreingjunum í Havn, hevur Judith Johannessen á Toftum tikið umleið 1962 í Trappugøtu (millum Tróndargøtu og Bøgøtu).

**Aftara rað f.v.:** Esmar Andreasen, sum júst hevur havt 35 ára starvsdag á gøtuljósdeildini hjá Tórshavnar kommunu, Høgni Mikkelsen, hvørs el-virkið nú ein dagin hevði 60 ára stovningardag, Marius Joensen, sum um hetta mundi, tá myndin er tikin, flutti við familju niðan á Hvítanes. Hann hevur í eini 30 ár búð í Hollandi. Jógvan Hendrik Johannessen, ið seinni bleiv rímiliga kendur frá tónleikalívinum í Havn, hevur búð í eini 30 ár í Danmark.

**Fremra rað f.v.:** Viggo Christiansen, sum í dag er leiðari fyri vatn- og gøtuljósdeildini hjá Tórshavnar kommunu, Eirikur Rasmussen, sum á myndini sær út til at vera málmaður, bleiv seinni ein av okkara allarbestu fótboltspælarum og spældi í nógv ár við HB. Hann koyrir í dag við egnum hýruvogni á bilstøðini Auto, Hans Petur Joensen, ella Petur sum hann vanliga verður nevndur, hevur síðani 14-15 ára aldur starvast í handlinum hjá P/F Valdemar Lützen.

*-red*

*Myndaeigari: Høgni Mikkelsen*

Fyri 30 árum síðan:

# Tekning hjá Óla P




Norðoyarstevnan verður hildin í dag og í morgin. Eisini í ár er »Rukkulakkin« útkomin. Myndin omanfyri er úr hesum skemtiteiti.

Tekning hjá Óla Petersen í Sosialinum 9. juni 1979.

**Dagurin 10. juni. Onuphrius**, deyður umleið ár 400. Eftir halgisøguni var hann kongssonur av Blálondum, sum gjørdist kristin. Eftir tað segði hann alt frá sær og livdi til sín doyggjandi dag sum einbúgvi í egyptisku oyðimørkini.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*